## Bíbliuvers á fartelefonina

Nú ber til at fáa „mannakorn“ á fartelefonina. Tænastan hevur verið royndarkoyrd í eina tíð, men er nú klár til marknaðin. Tað er sera einfalt, tú skrivar „vers“ í einum SMS boðum og send boðini til 1919. Dømi: Stuttval: vers Nummar: 1919 - Aftursvar: “Tí falla vit ikki í fátt, men um so okkara ytra menniskja ferst, tá verður tó okkara innara menniskja endurnýggjað dag frá degi. Tí at trongd okkara, sum er stokkut og lætt, virkar okkum út um alt mark og mát eina æviga tyngd av dýrd, við tað at vit ikki líta at hinum sjónliga, men hinum ósjónliga, tí at hitt sjónliga er tímiligt, men hitt ósjónliga ævigt. (2 Kor 4,16-18)”. Tænastan kostar einans kr. 2,6 umframt vanligan SMS takst. Bæði kundar hjá Føroya Tele og Kall kunnu brúka tænastuna



## Løgmaður á globaliseringsráðstevnu

Jóannes Eidesgaard løgmaður luttekur saman við hinum norðurlendsku forsætisráðharrunum á Nordisk Globaliseringsforum, sum verður í Riksgränsen í norður Svøríki í døgunum 8. og 9 apríl. Evnið fyri ráðstevnuna er globalisering, og forsætisráðharrarnir fara at luttaka í námsskeiðum og orðaskiftum um leiklutin hjá norðanlondum í globaliseringini. Serligur dentur verður lagdur á búskaparligan vøkstur og arbeiðsmarknað, umframt, umhvørvi, orka og veðurlagsbroytingar. Ráðstevnan er tann fyrsta av sínum slag, og løgmaður verður aftur í Føroyum hósdagin 10. apríl.

# Koyrdi Føroyar runt við fullum bili av narkotika

**Í fleiri dagar koyrdi ein ungur maður runt í Føroyum við narkotika fyri heilar 20 milliónir krónur í bilinum. Hann segði, at hann visti av ongum og tá ið hann endiliga fann útav tí, vildi hann ikki boða løgregluni frá**

NEVNINGATING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein maður segði í Føroya Rætti í gjár, at tá ið hann endiliga varnaðist, at hann koyrdi runt í Føroyum við fullum bili av narkotika, hvørki vildi ella tordi hann at melda. Fríggjadagin skulu teir 12 nevningarnir taka støðu til, um hann er sekur ella ikki. Tekningina úr rættinum í gjár gjørdi Hannis Egholm*

- Hetta er tað býttasta eg havi gjørt í lívinum.

Tað viðgekk ein ungur maður, sum í hesum døgum stendur ákærdur í Føroya Rætti fyri narkotikabrotsverk í heilt stórum stíli.

Í fleiri dagar síðsta heyst, koyrdi hann Føroya Land runt við narkotika fyri yvir 20 milliónir føroyskar krónur í bilinum.

Men hann tvíheldur um, at tað gingu fleiri dagar, áðrenn hann uppdagaði nakað sum helst

Men tá ið hann so endiliga fann útav tí, kom tað honum ongantíð til hugs at melda tað.

Og harmur á málinum staðfesti hann, at hetta er tað býttasta, hann nakrantíð hevur gjørt í lívinum.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, er hann ákærdur fyri í nakrar dagar í septembur í fjør at hava havt stórar mongdir av narkotika í varðveitslu fyri ein stórsmugglara.

Tilsamans er hann ákærdur fyri at hava havt yvir 24 kilo av amfetaminpulvuri, og sløk 15 kilo av ekstasypulvuri í varðveitslu í eina góða viku í september í fjør.

Ekstasypulvuri var nóg mikið til at gera yvir 200.000 ekstasytablettir burturúr.

Hann er eisini ákærdur fyri at hava verið við til at smuggla næstan alla hesa nøgdina úr Føroyum aftur til Íslands, saman við fleiri íslendingum.

Og í triðja lagi er hann ákærdur fyri at hava havt í varðveitslu næstan 800 gramm av amfetamini og næstan eitt kilo av ekstasypulvuri, sum varð nóg mikið til 14.000 ekstasytablettir.

Evnini hevði hann í varðveitslu við tí í hyggju at handa tað víðari til ein annan.

### Føroya dýrasti bilur

Ákærin segði í rættinum, at her er talan um so stórar nøgdir, at tað eru skerpandi umstøður.

Tí verður kravt, at maðurin verður dømdur eftir eini lógargrein, sum er strangari enn tann, sum vanlig rúsevnamál verða dømd eftir og verður hann dømdur sekur, kann hann fáa fleiri ára fongsulsrevsing.

Sakarmálið er eitt úrslit av nógv umrødda Norðstjørnumálinum, har tveir íslendingar løgdu at landi í Føroyum við einum stuttleikabáti á vegnum til Íslands.

Tað vísti seg, at báturin var fullur av rúsevnum, sum skuldu smugglast til Íslands.

Maðurin, sum er ákærdur í Føroyum og annar íslendingurin kendust væl frá fyrr av og áðrenn stuttleikabáturin kom til Føroyar, høvdu teir havt samband, tí tann ákærdi skuldi útvega teimum innivist og eina hjálpandi hond ímeðan teir vóru í Føroyum

Tað var gaman í og tað endaði við, at teir spurdu um ákærdi ikki kundi hava ymiskt hjá teimum í varðveitslu.

Tað var eisini gaman í og soleiðis endaðu nakrar taskur í viðførisrúminum í bilinum, har tær blivu liggjandi í fleiri dagar.

Men tann stóri spurningurin í Føroya Rætti í gjár var at fáa greiði á, um maðurin visti, at taskurnar vóru fullar av rúsevnum.

Sjálvur tvíheldur hann um, at hann onki visti fyrrenn beint áðrenn rúsevnini fóru av aftur landinum.

Ákærin fekk seg illa at trúgva, at hann onki skuldi vita um, hvat var í taskunum og at hann heldur ongantíð hevði spurt hinar, hvat var í teimum.

Men at hann, við vilja, heldur seg okunnugan, er eisini nóg mikið til at verða revsaður.

Tí gekk ein stórur partur av degnum í gjár við at ákærin royndi at vísa, hvussu væl ákærdi í íslendski smugglarin kendust.

Og teir kendust væl frá fyrr av og ákærdi visti eisini, at hin brúkti rúsevni.

Men hann segði, at talan var bara um reyp, tá ið hann í einum kjatti á internetinum hevði fortalt vinfólki, at íslendingurin var ein nokk stór kanón í undirverðini í Reykjavík.

Hann mintist heldur ikki at hann hevði fortalt eini gentu, at nú koyrdi hann runt í Føroya dýrasta bili.

Men tað hevur hann áður upplýst frágreiðingum til løgregluna ella til rættin.

Við fullum viðførisrúmi av narkotika, høvdu tey verið bæði í Eysturoy, Norðoyggjum, Suðuroy og í Havn hesar dagarnar.

### Hvørki vildi ella tordi

Tann ákærdi segði, at tá ið hann loksins fekk at vita, at hann hevði fyri 20 milliónir føroyskar krónur í bilinum, varð hann skelkaður.

Men tað kom honum ikki til hugs at melda. Tvørturímóti royndi hann, at fortrongja tað, tí hann vildi onki hava við rúsevni at gera og hann vildi bara hava hetta yvirstaðið.

- Eg valdi lættasta útvegin og tað var at fortrongja tað og látast sum onki, segði hann

Tað vóru tvær orsøkir til, at hann ikki meldaði.

Fyrra orsøkin var, at íslendingurin hevði verið hansara besti og einasti barndómsvinur.

Seinna orsøkin var, at hann tordi ikki, tí hann stúrdi fyri at tey í narkoverðini í Ìslandi fóru at hevna seg og tað kundi fáa álvarsligar avleiðingar fyri bæði hann sjálvan og fyri hansara næstringar.

Hann hugsaði heldur ikki um allar teir misbrúkarar og teirra familjur, sum hann við hesum var við til at oyðileggja lívið hjá.

Men hann helt, at hetta var tað býttasta, hann hevði gjørt í lívinum.

Hetta segði, at hetta var úrslitið av misskiltum trúfesti móti einum gomlum vinmanni. Men hann hevði eisini altíð verið bæði býttur og góðtrúgvin, tá ið tað ráddi um vinfólkini.

Hann váttaði kortini, at hann hevði tikið yvir eitt hálvt kilo av amfetamini og næstan eitt kilo av ekstasypulvuri, sum ætlanin var at grava niður, tí tað skuldi vera eftir í Føroyum og seinni skuldi onkur koma eftir tí.

Hann visti ikki, hvør skuldi koma eftir tí.

Teir næstu dagarnar skulu fleiri vitni avhoyrast og væntandi verður málið ikki tikið upp til dóms fyrrenn fríggjadagin.